# Middagssangur á trappuni



# INNIHALDSYVIRLIT


Kennir tú blómurnar . . . . . . . . . . . . . . . . . . 1

Blómubilur . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . 2

Vinir. . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . 3

Hey, so segði Ata . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . 4

Eins og áarstreymur rennur . . . . . . . . . . . . 5

Aldan . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . 6

Dukka mín er blá . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . 7

Eitt sunnukvøld í plantasjuni . . . . . . . . . . . 8

Kall og svein ungi . . . . . . . . . . . . . . . . . . . 9

Farvæl og takk . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . 10


Jensina Olsen stendur fyri og Rasmus Samuelsen spælir undir

# 1 Kennir tú blómurnar

Orð: Sólrun Michelsen 2003 Lag: Pauli Hansen 2003

1. Kennir tú blómurnar sum vaksa
her í Føroyum
Sólju og summardá
blákollu og baldursbrá
díkimura, danadá
og vøkru akkuleyu

2. Kennir tú grøsini
sum vaksa her í Føroyum
fjørugras og fransagras
húsagras og hjartagras
mánagras og mannagras
og mong mong onnur fleiri

3. Kennir tú berini
sum vaksa her í Föroyum
bláber og krákuber
brobber og rossaber
einiber og dunnuber
og summi kanst tú eta

4. Mangt ljóðar undarligt
sum veksur her í Föroyum
rossatunga, mýggjagras,
hostijavni, nalvagras,
apublóma, loppugras
ja, nógv er í at velja

# 2 Blómubilur

Orð og lag: Jensina Olsen 2008

1. Hagin eigur nógv sum grør,
alt so vakurt er,
beiggi mín í báti rør,
ský um himmal fer,
-ský um himmal fer.

2. Geri mær ein lítlan bil,
her eg siti sjálv,
róðrið er ein summardá,
krákuber til hjól,
-krákuber til hjól.

3. Nummarplátan er eitt blað,
takið er bert gras,
so er tað motorurin,
nei, tað er bert fjas,
-nei, tað er bert fjas

4. Lyktir eru sóljur tvær,
skína bjart og gult,
skína sjálvt tá regnið er,
fáa seg eit dult,
-fáa seg ei dult

5. Síðuspeglið er ein urt,
eg ei kenni til.
Skuldi kanska pápa spurt,
um hann hjálpa vil,
-um hann hjálpa vil

6. Átta ár, tað eri eg,
eigi fínan bil,
sólin kínir enninum,
gott at vera til,
-gott at vera til

# 3 Vinir

Orð og lag: Súsanna Tórgarð 2008

1. Eg bleiv so glað í morgun,
tá ið eg kom út.
Tú stóðst og bíðaði uttan fyri portrið.
Tú smíltist, og eg visti beinanvegin,
vit vóru vinir aftur, tú og eg.

*Vit klandraðust i gjár, og tá lovaði eg,
eg aldrin skuldi tosa aftur vid teg.
Nú súkkla vit i skúla, og tað er so gott.
Vit eru vinir aftur, tú og eg.*

2. Tú segði, at eg altíð var so ráðarík.
Eg segði, at tú vart ein grenjisurra.
Tá tókst tú bóltin, rymdi beinanveg,
og eg fór heim, eg var í øðini.

*Vit klandraðust i gjár...*

3. Eg stongdi hurðina á minum kamari,
og eg var bara inni allan dagin.
Um kvøldið fekk eg sms frá tær:
Tú ert tann besti vinurin hjá mær.

*Vit klandraðust i gjár....*

4. Vit fara heim til min at gera skúlating,
tú dugir nógv betri enn eg at rokna!
so spæla vit eitt spæla á telduni
og baka vaflur, tí tað dugi eg!

*Vit klandraðust i gjár, og tá lovaði eg,
eg aldrin skuldi tosa aftur vid teg.
Nú súkkla vit i skúla, og tað er so gott.
Vit eru vinir aftur, tú og eg.*

# 4 Hey, so segði Ata

Orð: Alexandur Kristiansen Lag: Knút Olsen

1. Hey, so seðgi Ata,
   við sína halta hupp,
   nú er tíð at lata,
   síni regn skjól upp.
   Síðani vit fara,
   út um dagsins gátt;
   lat so regnið bara,
   koma kalt og vátt.

2. Ganga vit og tvassa,
   runt tað heila kvøld,
   tøssa, sprutta, vassa,
   til vit verða køld.
   Áh, tann nógva væta,
   áh, tað fríska megn.
   Bangin? nei, nei, Ata,
   ræðist ikki regn.

# 5 Ein og áarstreymur rennur

Orð: Maurentius S Viðstein  Lag: Robert Sauer u.1923

1. Eins og áarstreymur rennur
vallar hugurin hjá mær,
og í barmi mínum brennur
longsil út um bygdagarð.
Eg vil skoða villar víddir,
eg vil njóta sól og vind !
Fagurt hagin nú er skrýddur,
lætt fer lot um fjallatind.

2. Felagar, tit pjøkan takið,
kom í hagan burt við mær,
vendið bygdini so bakið –
móti okkum sólin lær.
Hoyrið fuglaljóð í haga,
síggið seyðafylgi mong,
dýr og menniskju seg gleða;
trív tí í ein vallara song !

3. Tá ið eftir dagsins hita,
kaldligt lot um víddir fer,
snípan letur okkum vita,
at tað hvíldarstund nú er,
og tá fara vit í tjaldið
og vit sova sælan blund,
inntil náttin missir valdið
á tí snimmu morgunstund

# 6 Aldan

Orð: Gunnar Hoydal 1979 Lag: Annika Hoydal 1979

1. Altíð ræddist eg taran í sjónum
Rekandi vøkstur um klettar og brot
Síðani, saman við ótta og vónum,
hevur tú rikið mí hjarta á flot.

Tak í meg, tak í mín iva,
nem við meg, nert ikki við,
sissa meg, tá eg vil liva,
øs meg, tá eg biði um frið.

2. Nú ert tú aldan, og eg eri tarin,
dregur meg at tær og rekur meg frá,
eigi teg, eigi teg, tá tú ert fegin,
veit at eg missi teg, tá tú ert hjá.

Tak í meg.....

3. Alt tað, sum lokkar og alt, sum vil styggja,
fløðandi, fjarandi ert tú í mær,
lyftur meg upp nú og letur meg liggja,
myrkrið, sum bjargar og ljósið, sum slær.

Tak í meg........

4. Ræddist eg sjógvin við myrkri og megi,
visti meg stíga á ótryggan veg,
líknandi leið, men við rekandi gleði,
gangi eg nú, nú ræðist eg teg.

Tak í meg, tak í mín iva,
nem við meg, nert ikki við,
sissa meg, tá eg vil liva,
øs meg, tá eg biði um frið.

# 7 Dukka mín er blá

Orð: Hans. A. Djurhuus  Lag: Regin Dahl 1944/45

1. Dukka mín er blá,
   hestur míner svartur
   ketta mín er grá,
   máni mín er bjartur,
   gyllir hvøra á.

2. Og ein summardag,
   fara vit at ferðast
   langa leið avstað,
   tá skal dukkan berast,
   tá er systir glað.

# 8 Eitt sunnukvøld í plantasjuni

Orð og lag: Birni Dam 1955

1. Eitt sunnukvøld í plantasjuni,
har sita tvey lið um lið.
Ein genta og ein drongur,
nei, nú orki eg ikki longur.
Eg aftan fyri tey lá
eitt sunnukvøld í plantasjuni.

2. Tey tosa um stjørnur og mána
sita eina løtu og gána,
men so loypa tey upp við ein hvøkk
– tað var nakað, sum gjørdi tey kløkk.
Hetta aftan fyri tey lá
eitt sunnukvøld í plantasjuni.

O góða, o góða, kom og set teg her hjá mær!
O góða, o góða, kom nú, meðan slett eingin sær.
Her er so góður friður, so tú kanst seta teg niður,
:,: her er so gott og so hugnaligt,
tí tú ert mær so fitt so fitt :,:

3. Eg fjaldur undir greinunum lá
fyri tey meg ei skuldu sjá,
men so kom eg til at bróta eina grein,
so tað runt um plantasjuna hvein.
Tað var hetta sum gjørdi tey kløkk
eitt sunnukvøld í plantasjuni.

# 9 Kall og svein ungi

Lag: Kvæðalag (Segði kall/segði svein ungi) Orð: Kvæði

1. „Hvar rakst tú neyt míni?“
segði kall –
„Beint niðan í akur tín!“
segði svein ungi.

2. „Skamm fái tú rekandi!“
“So fái tú biðjandi!”

3. „Hevði eg hildi á spóni mínum!“
„Staðið fastur í góma tínum!“

4. „Hevði tú verið flongdur!“
„Við mjúkari ostflís!“

5. „Við skørpun áli!“
„Ryggur tín ligið undir!“

6. „Hevði eg hildið á knívi mínum!“
„Staðið fastur í lívi tínum!“

7. „Hevði tú hingið í berginum!“
„Góð lína á mær!“

8. „Einfaldur hosnatráður!“
„Sjálvur tú á endanum!“

9. „Hevði tú flotið á havinum!“
„Góður bátur undir mær!“

10. „Ongar árar!“
segði kall
„Ættin ligið at landinum!“
segði svein ungi.



# 10 Farvæl og takk

kanon/ókendur Orð: Andreas Andreasen týddi e.Per Borgsten

:/:Farvæl og takk, nú fari eg,
og eg vóni, at vit síggjast eina aðra ferð.:/:
:/: Vit síggjast, vit síggjast,
og eg vóni, at vit síggjast eina aðra ferð.:/:

